# “Vit fara ein túr til Danmarkar”



Nú summarið nærkast og fólk fáa feriu, so eru tey eisini fleiri, sum ætla sær ein túr av landinum. Tað ætlar Halla Gullfoss sær eisini, tá vit spyrja hana, hvat hon ætlar sær í summar. – Tað verður túrur til Danmarkar við børnunum í 14 dagar. Vit fara at búgva í smáttum og ferðast runt í landinum, soleiðis at børnini fáa so nógvar og góðar upplivingar sum gjørligt.

Heima í summar havi eg ætlanir um eitt hvørt. Eg kundi sera gott hugsa mær Jóansøkufestival. Tað hevði bara verið fyri at lurta eftir Andrew Strong, men tað fari eg so ikki kortini. Men eitt, sum eg heilt sikkurt fari í summar, er at mála húsini. Málingin varð keypt í fjør, so nú er um at koma í gongd, sigur Halla Gullfoss.




















